## Noreg nýggja stjórn

Aftan á norska stórtingsvalið herfyri samdust Arbeiðaraflokkurin, Sosialistiski Vinstraflokkurin og Miðflokkurin um at halda fram í stjórnarsamgongu, og fyrrapartin bleiv tann nýggja ráðharramanningin almannakunngjørd. Tann størsta broytingin er helt, at Sigbjørn Johnsen úr Arbeiðaraflokkinum yvirtekur fíggjarmálini frá Kristin Halvorsen úr SV, sum verður vitanarráðharri ístaðin fyri. 20 ráðharrar eru í nýggju stjórnini hjá Jens Stoltenberg. Arbeiðaraflokkurin hevur 12, og Miðflokkurin og SV hava fýra í part.



## Eingin vinnari

Á hvørjum ári hava fyrrverandi ríkis- og stjórnarleiðarar í Afrika møguleika at vinna eina serliga heiðursløn fyri góða embætisførslu. Men hóast vinnarin fær fimm milliónir dollarar umframt sjálvan heiðurin, var eingin leiðari funnin verdur til at vinna í ár. Vanliga verður heiðurslønin latin einum demokratiskt valdum fyrrverandi leiðara, men søgan vísir, at tað hevur ofta verið trupult at finna ein egnaðan vinnara. Tí er heiðurslønin bara latin tvær ferðir. Í 2007 fór hon til Joaquim Chissano, fyrrverandi forseta í Mozambique, og í 2008 varð hon latin Festus Gontebanye Mogae, fyrrverandi forseta í Botswana.

# Føroyar skulu hava eitt




*- Eg vænti, at ein avgerandi fyritreyt fyri, at føroyskar fyritøkur kunnu standa seg í kappingini við onnur, er, at vit duga at samstarva innanhýsis, og at vit duga betri at samskipa okkara útflutningsátøk úti í heimi, segði Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, tá hann setti FaroExpo*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Tá Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, setti FaroExpo í morgun, segði hann, at skulu vit tryggja okkum eitt optimalt samstarv millum tað almenna og ymsu partarnar av føroysku útflutningsvinnuni, er loysnin at skipa eitt útflutningsráð, har vinna og almenni myndugleikin í felag virka fyri at menna føroyskan útflutning**

FAROEXPO

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vinnustevnan FaroExpo varð sett í ítróttarhøllini í Runavík klokkan 9 í morgun. Fyri sjálva setanina, sang ein kvartett úr Glyvra kirkju nakrar vakrar sangir, og lagt varð fyri við sanginum ”Tá ið teir sóu landið” og síðan ”Dýrd á vík og vág...”.

Vegna tiltakið beyð Árni Joensen øllum vælkomnum, og síðan setti uttanríkisráðharrin, Jørgen Niclasen, stevnuna.

### Føroyar altjóðagjørdar

Hóast vit sjáldan gera okkum far um tað, eru Føroyar kanska tað landið í heiminum, sum í størstan mun er altjóðagjørt. Alt, sum vit framleiða, útflyta vit og alt, sum vit brúka, innflyta vit. Tískil er frælsur handil millum fyritøkur og millum lond ein fyritreyt fyri vøkstri og menning her á landi.

- Hetta prógvar søga okkara so dyggiliga, segði hann.

Jørgen legði aftrat, at fram til miðskeiðis í 19. øld var bannað føroyingum at handla sínámillum og at handla við umheimin.

- Um hesa tíðina búðu 5000 fólk í Føroyum. Flestu stríddust undir kørgum korum og livdu frá hondini í munnin.

Landsstýrismaðurin vísti á, at síðan henda skipan varð avtikin, og føroyingar sluppu at handla sínámillum og við umheimin, er fólkatalið í Føroyum upp á 150 ár 10-faldað, og vit teljast millum heimsins fremstu tjóðir.

- Frælsur samhandil við umheimin er ein fyritreyt fyri framhaldandi menning her á landi, og tískil er eitt høvuðsmál í okkara uttanríkismálum at menna okkara handilssamband við umheimin. Hetta verður gjørt við at økja okkara møguleikar í altjóða høpi og at skapa vinnufyritøkum bestu marknaðaratgongd.

- Landsstýrismaðurin vísti á, at Føroyar í løtuni hava handilssáttmálar við ES og EFTA-londini Ísland, Noreg og Sveits. Talan er soleiðis um fýra sáttmálar við tilsamans 30 lond, legði hann aftrat.

Jørgen Niclasen segði, at Føroyar sum tjóð vilja longur fram á leið í hesum høpi.

- Okkara mál er at fáa í lag avtalu við ES um tey fýra frælsini – vørur, tænastur, kapital og perónar. Vit vilja eisini gerast limir í EFTA. Ein slíkur limaskapur merkir, at vit gerast partur av altjóða kervi. Haraftrat fáa vit tá ágóðarnar av teimum umleið 30 fríhandilsavtalunum, sum EFTA hevur við lond kring allan heim.

### Marknaðaratgongd

Landsstýrismaðurin vísti á, at marknaðaratgongd er fyrsta fyritreytin fyri at kunna menna okkara útflutningsvinnu.

- Tað er eisini ein sannroynd, at marknaðaratgongd í sær sjálvum ikki er nóg mikið til at skapa okkara útflutningsvinnu nøktandi karmar.

Jørgen segði, at skulu vit menna okkara kappingarstøðu krevst, at vit í Føroyum gerast nógv betri til at arbeiða saman, læra av hvørjum øðrum og nýta førleikarnar hjá hvørjum øðrum.

- Bert á henda hátt kunnu vit fáa eitt grundarlag at standa okkum í kappingini við onnur.

Landsstýrismaðurin vísti á, at í eina heila øld hava føroyingar útflutt fisk á evropeiska meginlandið.

- Á hesum marknaði hava vit kappast við útflytarar kring allan heim. Hóast vit hava havt heimin sum okkara marknað, og hóast okkara argastu kappingarneytar í flestu førum hava verið risa stórar og sterkar útlendskar fyritøkur, so hava vit ofta hildið, at okkara granni ella onkur hinumegin fjørðin, sum eisini fæst við fiskaútflutning, er okkara argasti kappingarneyti, segði hann.

### Hugburðsbroyting

Jørgen Niclasen endurgav kendu orðini, at ”saman at standa var ei okkum givið....” og helt fyri, at hesi orð munnu vit flest øll hava hoyrt so ofta, at vit hildu tað vera meira ella minni náttúrligt, at føroyingar altíð klandrast og kappast innanhýsis og ongantíð